## VIÐMERKINGAR

# Einsamalla planetin Klaksvík

DORIT HANSEN

Nú letur Norðoytunnilin skjótt upp, og fjølmiðlarnir stúra fyri, hvussu Klaksvíkingar skulu yvirliva mentanarhvøkkin. Klaksvíkingar gleða seg at sleppa at koyra beinleiðis inn á meginlandið, men fara hinir føroyingarnir at tíma norðureftir? Hevur Klaksvík annað at bjóða enn uppgevandi handilsmenn, manglandi ungdómstilboð, svartar samkomur og útideyðaveður?

Klaksvík hevur fleiri aftvurvendandi árlig tiltøk, sum altíð samla í hundratals og túsundtals av fólki. Har er Norðoyastevnan, Summarfestivalurin, og Sjómannadagurin. Har er stóri jólamannadagurin í desember, og har eru stór ítróttartiltøk, sum til dømis fimleikaframsýningin sunnadagin, har trýhundrað børn og ung vístu síni kynstur fyri umleið túsund áskoðarum.

Men eisini allar hinar dagarnar í árinum er Klaksvík eina vitjan verd. Lat okkum siga, at ein smábarnafamilja fer norð ein dagstúr, hvar skulu tey fara, og hvat skulu tey gera?

Fyrst fara tit at shoppa. Maðurin fer í Føroya besta manna-BR beint við tunnilin, har hann finnur øll amboðini, hann ongantíð hevur droymt um. Konan fer eina rundu í skógvahandlarnir, har tann fyrsti er á støði við teir bestu í Havn, tann næsti liggur á Keypmannahavna støði, og tann triði fyri tað kundi ligið í London. Ert tú meira til kreativitet enn skógvar, kanst tú fara í onkran av mongu tógvhandlunum ella í eitt av heimavirkjunum.

Síðani fara tit saman eina rundu í tað, sum má sigast at vera størsta konsentratión av handlum spesialiseraðir í smátingum til heimið. Klaksvíkingar eru tiltiknir heimkærir, so tað er kanska ikki so løgið, at júst teir hava eitt so stórt og spennandi úrval av handlum við pyntitingum. Og til síðst kunnu tit fara út í Leikalund, har stóribeiggin kann seta seg at lurta eftir fløgum, systirin setur seg millum allar barnabøkurnar, mamman hyggur eftir málningaframsýningini, og pápin setur seg við einum cappuccino og hyggur gjøgnum ein dunga av bókum, sum hava fangað hansara áhuga.

Blíva børnini (og maðurin) troytt av handlum, kunnu tit fara á okkurt av almennu spæliplássunum, ein møguleika tit ikki hava, um tit fara til Havnar. Ella tit kunnu fara ein túr út í Grøv við vøkru og spennandi ánni, har børnini kunnu fanga síl eftir øvugta put-and-take prinsippinum – fyrst fanga og síðani seta í aftur til onnur at fanga. Ella tit fara ein túr til Kunoyar, har plantagan er minni enn tann í Havn, men hon hevur harafturímóti ein steyrrættan fjallavegg sum loft, og Kallsoyarfjørð sum útsýni. Er veðri ikki til áir og plantagir, kunnu tit fara í Føroya absolut besta býarbókasavn ella í stóru og lekru svimjihøllina í býnum.

Og so skulu tit eisini hava okkurt at eta. Matstovurnar eru ikki nógvar har norðuri. Tit kunnu keypa tykkum pizza ella búrgara at eta í bilinum, ella tit kunnu fara á tað einastu veruligu matstovuna í býnum, men sjálvt um hendan er betri enn nógvar í høvðustaðnum, so hevði eg heldur bíða, til tit fara norð aftur tveyeini, tí har er bæði hugnaligt og romantiskt. Nei, besta loysnin er nokk at vitja onkran gamlan floksfelaga ella okkurt syskinabarn, sum tú ikki hevur sæð í hundrað ár. Tí klaksvíkingar eiga, sum vit vita, fjálg og hugnalig heim. Og tá teir hava búð so einsamallir har norðuri í so mong ár, fer tað ikki at skorta við gestablídni, nú teir endiliga fáa vitjan.

# Túsundtals børn á bíðilista til Musikkskúlan

TÍÐINDASKRIV
*frá Tjóðveldisflokkinum*

Túsundtals børn standa á bíðilista til Musikkskúla Føroya.

Hagtøl vísa, at umsóknirnar eru tvífaldaðar síðan 1998 og lærarakreftir eru ónýttar orsakað av vantandi játtan.

Bert í Havn eru uml. 3000 børn á bíðilista, og av teimum kundu 1200 byrja í morgin, um fíggjarlig játtan var fyri tí.

Tjóðveldisflokkurin hevur lagt uppskot fyri tingið um at hækka játtanina við 2,5 mió. kr., og hetta fer at geva 620 næmingum afturat undirvísing í musikkskúlanum..

Musikkskúlin hevur ætlanir um at brúka peningin til:
at fáa klaverlærarar til Vágar og Tórshavn,
sanglærarar og trummulærarar til Eysturoynna,
gittar-lærarar til Klaksvíkar og almennan musikkpedagog til Sandoynna

Musikkskúlin vísir á, at tað er ein stórur trupulleiki at fáa útlendskar lærarar hendan vegin, tí teir ikki hava annað at halda seg til enn frálæru, meðan tað er vanligt aðrastaðni, at lærarar hava krav uppá at nýta helvtina av arbeiðstíðini til frálæru og helvtina til at spæla og framføra sjálvi.

Um allur núverandi tørvurin á musikkskúlaøkinum skal nøktast, so skal landið játta 5,3 mió. kr. og kommunurnar 5 mió. kr. (kommunurnar gjalda í sín lut eina upphædd, sum svarar til 80% av tí, sum landið játtar til rakstur av musikkskúlanum).

# Játtanarskipanir og fíggjarpolitikkur v.m.

JÓGVAN SUNDSTEIN



Fara vit 30-40 ár aftur í tíðina arbeiddi Løgtingið nógv við grunnum. Har vóru havnagrunnur, vegagrunnur, grunnur til endurnýggjan av fiskiskipaflotanum o.s.fr. Hetta sást aftur á fíggjarlógini við ymiskum játtanum, men ikki við nýtsluni. Hinvegin sást á status (ikki rakstrinum) játtanin øðrumegin og nýtslan hinumegin fyri hvønn grunn sær. Argumentatiónin fyri hesi skipan var, at játtanir kundu "goymast" til seinni ár. Hetta vísti seg sum frá leið ikki at vera hóskandi, og grunnarnir vórðu so við og við avtiknir, og játtanarskipanin og roknskaparførslan gjørd meiri liðilig.

Nú liggur á tingborði uppskot til løgtingslóg um landsins játtanarskipan. Eftir hesum uppskoti skal í prinsippinum alt, sum hevur við almennar (eg meini ikki bara við lands) skipanir at gera, fara yvir fíggjarlógina og inn á landskassans roknskap. Á hendan hátt kann skjótt ivi stinga seg upp um, hvør eigur hvat av samfelagsins búskaparligu ognum. Sjálvt um ætlanin ikki er, at landskassin skal eiga alt, so kann hetta skjótt gerast endin. Tað vil siga ein sníkjandi nationalisering.

Sum heilt náttúrligt er, hevur orðaskifti tikið seg upp, um til dømis arbeiðsloysisskipanin á hendan hátt endar beinleiðis í landskassanum. Størsta varsemi má tí vísast, áðrenn ein slík lóg um játtanarskipan verður samtykt.

### Skattur

Høvuðsspurningurin, ella í hvussu so er ein sentralur spurningur, er, hvat ið skal skiljast við hugtakið skatt. Hetta má tí útgreinast sera neyvt. Tað er ikki nógmikið at siga, at skattur (sum skal á fíggjarlógina) er gjøld, sum verða kravd frá fólki uttan beinleiðis mótveiting. Tað má heldur vera ein orðing, sum sigur nakað um, at skattur er gjøld upkravd av landið ella kommunum, og sum ikki eru ætlað til serstakt endamál. Vit hava í løtuni hesar skattir (ikki úttømandi):

- Inntøkuskattir:
- Landsskatt, persónar
- Partafelagsskatt
- Kommunuskatt, persónar
- Nýtslugjøld:
- Meirvirðisgjald
- Toll- og innfluttningsgjøld
- Skrásetingargjøld, akfør

Harafturat hava vit ymisk brúkaragjøld, sum ikki eru skattir, men kortini hoyra heima á fíggjarlógini, tí tey eru gjøld fyri nýtslu av almennum stovnum. Dømi eru tinglýsingargjøld, gjøld til Bileftirlitið, gjøld til Felagsskrásetingina o. s. fr.

Neyvan er nakar ivi um, at kommunuskattur ikki hoyrir heima á Løgtingsins fíggjarlóg, hann er at finna á fíggjarætlanunum hjá ymisku kommununum. Hinvegin eru hinir inntøkuskattirnir og nýtslugjøld inntøkur hjá landskassanum, uttan at tær fara beinleiðis til nakað serstakt endamál, men til alla felags puljuna hjá landskassanum.

### Gjøld til beinleiðis endamál

Síðani hava vit tey gjøld, sum orðaskifti seinastu tíðina hevur staðið um. Tey mest týdningarmiklu av hesum eru gjøldini til: arbeiðsloysistryggingina, samhaldsfasta og barsilsskipanina. Øll hesi gjøld eru beinleiðis prosentpartur av lønargjaldingum, sum bæði løntakarar og arbeiðsgevarar rinda. Gjøldini fara beinleiðis í grunnar til nevndu endamál, og kunnu ikki brúkast til annað enn endamálini. Samhaldsfasti verður umsitin av egnari nevnd, eins og arbeiðsloysistryggingin og barsilsskipanin. Tvær tær seinast nevndu skipanir eru tengdar at pørtunum á arbeiðsmarknaðinum.

Føroyska arbeiðsloysisskipanin ALS sá dagsins ljós fyrst í nítiárunum. Tá vóru ringar tíðir. Men skipanin gjørdist veruleiki í góðum samarbeiði millum arbeiðstakarar og arbeiðsgevarar. Politiski myndugleikin hjálpti til, men skipanin kom at vera umsitin av arbeiðsmarknaðinum, og hon hevur vaksið seg sterka, og í flestu lutum hevur hon virkað væl. Okkurt kann bøtast um, men tað kann tað júst tí, hon ikki er fløkt inn í landskassans og politikaranna valdsøki. Líknandi útlit eru vónandi eisini fyri barsilsskipanini. Føroyar hava fingið eina skipan fyri arbeiðsloysisstuðli, sum virkar væl betur enn í flestu øðrum londum. Tí má hon ikki oyðileggjast av formalitetskrøvum.

Samhaldsfasti er nú við at koma fyri seg. Min meting er, at hendan skipanin eisini er, ella í øllum førum, verður, betur enn flest aðrastaðni. Tá ið skil er fingið á pensiónskombinatiónina: fólkapensión/eginpensión/samhaldsfasti, rokni eg við, at føroyingar kunnu breiða uppá seg, hvat fíggjarligu eldravælferðini viðvíkur.

Tað hevur tí alstóran týdning, at hesi trý nevndu økini ikki fløkjast inn í vanliga almenna forbrúkið yvir løgtingsfíggjarlógina. Neyðugt er tí, at tey virka sum sjálvstøðugar skipanir við egnari leiðslu og umsiting og roknskaparførslu. Inntøkurnar vera uppkravdar frá teimum, sum skulu njóta gott av teimum og fara bert til viðkomandi endamál. Tí er definitiónin ikki skattur, men gjald til egna vælferð.

### Samlaða almenna nýtslan

Um ynski at fáa øll gjøldini á fíggjarlógina og landskassaroknskapin botnar í, at so kann síggjast á einum staði, hvussu stór almenna nýtslan er, so kann sigast, at hetta ikki skuldi veri neyðugt í einum nútíðar samfelag.

Fyri at síggja hesa nýtslu, so ber til at samantelja roknskapartølini fyri landskassan, kommunurnar, samhaldsfasta, ALS og barsilsskipanina og møguliga onnur liknandi øki.

At enda skal viðmerkjast, at tað eru áhugaverdir tankar, sum eru frammi um, at kommunurnar skjótt verða samanlagdar til eini 7-8 størri eindir, og at hesar yvirtaka fleiri málsøki. Tá kunnu tær eisini, sum Anfinn Kallsberg hevur ført fram yvirtaka uppkrevjingina av skatti og harvið fíggja sínar útreiðslur, meðan landskassin fyrst og fremst hevur nýtslugjøldini og part av felagsskattinum sum inntøkugrundarlag.

